


www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 07 - 2012

# Hýruvognsførarar bjóða oljuvinnu vælkomnari

Oljuskipini, sum koma til Føroya at skifta manning, eru sera kærkomin millum hýruvognførararnar í høvuðsstaðnum. Tey eru eitt gott íkast hjá hýruvognunum, sum eisini gera alt fyri at kunna bjóða ein so professionella og álitisvekjandi tænastu sum gjørligt. Oljan.fo hevur tosað við ein av hýruvognsførarunum, sum fegnast um gongdina. Virksemi veksur aftur Vit minnast tey øll alskyns oljufólk í hundraðtali sum komu til Føroya miðskeiðis í 90-unum fyri at vera partur av føroysku fyrireikingunum til oljuleiting. Hetta gav samanlagt nógv eftir seg til føroyska samfelagið. Flogfelagið, hotellini, matstovurnar, hýruvognarnir oo. høvdu øll úr at gera. Fyri altjóða oljufeløgini vóru Føroyar nýggja staðið. Oljufundini vestan fyri Hetland høvdu víst vegin longur vestureftir. Nýfikni og forvitni fingu oljufeløgini at síggja Føroyar sum tann nýggja Norðsjógvin. Eftir fleiri turrar brunnar minkaði áhugin, og hetta sást eisini aftur á tí minkandi virkseminum á landi. Nú vit skriva 2012, og tvey av heimsins kendastu oljufeløgum hava gjørt av at brúka eina milliard krónur at bora enn ein brunn, tykist gongd vera komin á aftur gamla virksemið. Eisini er tað vorðið meira og meira áhugavert fyri reiðarí, sum arbeiða í frálandavinnuni, at leggja leiðina til Føroya at skifta manning og fáa umvælingar gjørdar. Og hetta merkja ikki minst hýruvognsførararnir í høvuðsstaðnum. Úr at gera Oljan.fo hitti ein teirra, Siggvard Joensen, tá hann hevði hevði fingið túr oman á oljukeiina eftir fleiri av manningini á Esvagt Connector, sum skuldu koyrast til flogvøllin. Hann hevur koyrt hýruvogn í tvey ár og sigur, at koyringin við oljufólki hevur verið eitt fantastiskt ískoyti. Til tíðir hevur tað gjørt, at teir hava havt tvífalt at gera - og reiðiliga tað. Og hetta hevur vundið alvorliga uppá seg, tá olju- og frálandaskip eru komin til Havnar ella oljuhavnina í Runavík at skifta manning. Tað gav at bíta, tá almenni norski oljumyndugleikin saman við Thor gjørdi av at brúka Føroyar sum

útgerðarstøð fyri eini stórari verkætlan at skjóta seismikk við Jan Mayen. Tá varð Havnin vald til útgerðarstøð, og hetta kom væl við hjá hýruvognsvinnuni í høvuðsstaðnum. Hon slap av álvara at royna seg. Stóra seismikkskipið Nordic Explorer kom á Havnina í farna mánað og øll manningin, sum taldi nærum 100, skuldi við flogfarinum. Hetta varð ein stór avbjóðing fyri hýruvognsfeløgini í býnum, tí skiparin setti rættiliga høg krøv til tænastuna. Hon kravdi nógvar bilar, men tað kláraðu tey væl. Auto hevur 31 bilar. Hetta var so størsta einstaka uppgávu tey hava fingið uppá so stutta tíð. Í hesum førinum var talan um at avheinta fólkini á øllum gistingarhúsunum í býnum og koyra tey til flogvøll til ásettu tíðina. Hetta var sum ein sveinaroynd fyri okkum, og eg haldi vit kláraðu hana væl, sigur Siggvard. So fyrsta vinnan, ið veruliga merkir nakað til oljuvinnuna, eru hýruvognarnir, og í hesum eina førinum skuldu nærum 100 fólk koyrast í Vágar og sama tal aftur til Havnar. Umframt manningarskifti so koma eisini oftani reparatørar við flogfari, so talið verður nógv hægri. Siggvard Joensen sigur, at hann torir næstan ikki at hugsa, hvat tað kann blíva til, um Statoil ger eitt fund á landgrunninum. Tað fer í hvussu er at skapa ein tørv og fer tað eisini at gera arbeiðið meira hugaligt sigur Siggvard. Gongdin seinastu árini har oljuleitingin nærkast Føroyum bæði á norskari og enskari síðu og nú eisini er við at taka seg upp Grønlandi fyri norðan, hevur av álvara sett Føroyar á kortið. Reiðarí síggja møguleikar at spara tíð og pengar við at brúka Føroyar sum støð. Hetta gevur føroyskari vinnu bæði møguleikar og avbjóðingar. Ein teirra, sum heldur okkum vera førar fyri at møta hesum avbjóðingum, um vit veruliga vilja tað, er Siggvard Joensen. Hann heldur vit eiga at leggja okkum í geyma at kunna veita ta best hugsandi tænastuna, antin talan er um hýruvognsvinnuna, skipasmiðjurnar, heilsølurnar og onnur. Mynd -  Siggvard Joensen er ein av mongu góðu hýruvognsførarunum í høvuðsstaðnum. Hann bjóðar oljuvinnuni vælkomnari til landið. Oljuskipini eru longu eitt sera gott íkast hjá vinnuni. Eitt av kendu andlitunum í hýruvognsvinnuni í høvuðsstaðnum hevur flutt oljumenn trygt úr Vågum til Esvagt Connector í Havn. Eisini uppi á Hotel Føroyum hava hýruvognarnir úr at gera at flyta oljufólk Myndatøka oljan.fo/Jan Müller